Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



# Fuglurin kom til sættis

**Fuglur hevði stóran týdning í Stóru Dímun. Hesum greiðir Janus eisini frá:**

Tað var so nógvur fuglur í Dímun, og hann hevði sjálvsagt sín stóra týdning fyri húsarhaldið. Gamalt var, at ein tunna av saltaðum fugli skuldi vera árliga til hvørt fólk. Ein tunna var knapt 600 lundar ella 250 lomvigar.

Lomvigin plagdi at koma í bergið á kyndilsmessu fyrst í februar. Hagreiðingin av lunda og lomviga var ymisk. Lomvigi varð kruvdur, men lund bert skuldi magadragast. Til døgurða varð roknað við einum lomviga ella trimum lundum til hvønn persónin.

Á jóansøku kom fyglingin fyri. Til tess kravdist nógv manning og komu teir millum annað úr Sandvík og Dali at hjálpa til.

Bjargalínurnar vóru ymiskar til longdar. Tann longsta, nevnd Stóralína, var 120 favnar. Tað skuldi hegni til at síga í Dímun. Nógva staðni er loft í berginum, og tá hongur fleygamaðurin í leysari luft.

Fleygalínan var um veturin í síni tíð goymd á kirkjuloftinum, so stórt var tað. Har kundu fólk enntá sita.

Á Stóru Dímun var ein gøta, sum gongur allan vegin kring oynna. Á hvørjum ári, áðrenn fuglatíðin kom fyri var farið eftir gøtuni við hakkara og spaka fyri at beina burtur eyr og grót, sum rutt var niður um veturin.

Tað var eisini tað serliga í Dímun, at har vóru teir ikki mannaðir at draga fleygamannin við fongi uppaftur. Hann var tí línaður niður á helluna. Fleygamaðurin kom tá upp gjøgnum Kleivina og veiðan varð drigin upp í Dráttin.

Lundin kom á summarmála 14. apríl. Tá hann var komin í holuna um miðjan mai var farið at draga lunda. Hvør maður hevði sítt serstaka stað. Tá kundi bóndin við at kanna holurnar finna fram til, hvør ið fór illa um holurnar. Húskallarnir høvdu sum setning at draga 100 lundar um dagin, og setningurin hjá arbeiðskonunum var eisini at royta 100 lundar.

Á jóansøku var hildið uppat at draga lunda, og tá var farið at fleyga bæði lunda og lomviga. Við fleyging kundi fáast eitt stórt tal av lunda. Dømi eru um, at tað kundu fáast yvir 1.000. Tað vóru tó fáa støð, har lomvigi fekst á flogi

Tað kundi fleygast á øllum ættum uttan eystri. Eisini kundi fáast væl av havhesti, og tað bleiv eisini sligið havhestaungar. Teir uttanoyggjamenn, sum komu at hjálpa, fingu fugl afturfyri.

### Ræning-tøka av eggum

Vit gjørdu nógv av at selja egg. Tað er tiltikið, at lomvigareggini skuldu vera so øgiliga sterk. Tað hevur verið sagt, at dettur eitt lomvigaregg við nóg stórari ferð niður í ein bát, kann tað bróta seg gjøgnum bátin. Hatta havi eg nú ikki upplivað sjálvur.

Teir á Gørðunum í Vági tóku fast egg frá okkum, teir komu sjálvir eftir teimum við báti. Men vit plagdu sjálvir at fara við báti til Tvøroyrar at selja egg. Tað vísti seg, at tað var serliga fiskafólkið, sum hevði áhuga fyri at keypa, so har plagdu vit at leggja at.

Eggini hildu sær nokk so leingi, ein mánaða. Tey kundu vera saltað og kundu eisini nýtast til vetrarføði.

Vit plagdu at fáa 8-10 oyru fyri eggið. Eg minnist, at vit í 1936 fingu eina 60 favna langa bjargalínu. Hon kostaði kr. 600. Mamma segði, at ræningin hetta árið betalti hesa línuna. Hetta merkir so, at vit hava selt eini góð 6.000 egg. 600 krónur hevur verið eitt gott ískoyti tá í tíðini, ein heil fiskimannaløn.

Bjargalínur vóru annars keyptar úr Bretlandi. Tær vóru um 4 tummar í ummát. Tað var eitt krav, at festarin skuldi halda línuna. Tað var tað trygga við bjargalínum, at tær slitnaðu ikki. Tær kundu í ringasta fall togna.

### Kol fyri lunda

Línurnar til Dráttin at draga vøru upp frá helluni vóru úr manilla. Tær kundu í ringasta føri slitna.

Mamma hevði ein fastan mann Gøtu Símun. Hann var ættaður úr Norðragøtu men búði á Tvøroyri. Teir vóru tveir beiggjar og eisini tvær systrar giftar til Suðuroyar. Beiggjarnir vóru Símun og Magnus og systrarnar Olevina og Elsa. Pápi teirra var Liða Dávur (Poulsen.)

Símun átti eitt seksmannafar við motori. Hann sigldi út til Dímunar í fleygatíðini. Hann tók fuglin frá fleygingarmonnunum, sum teir blakaðu á sjógv, og so seldi hann fuglin fyri okkum á Tvøroyri óroyttan. Tað var mest lundi, sum varð fleygaður í Dímun.

Fuglur varð royttur í oynni til húsbrúk. Fjøðurin varð eisini nýtt til dýnur og tílíkt. Hetta var bert lundafjøður, tí lomvigafjøður var so grov og tung. Fjøður varð eisini seld. Hon fór vist av landinum.

Fyrst eg minnist var havhestur eisini royttur. Tann fjøðurin fór í hvussu er av landinum.

Tað komu menn aðra staðni frá at fleyga. Millum hesar vóru hvalbingar. Teir høvdu ofta nakrar sekkir av koli afturfyri. Hetta lætti eisini um.

Arne Nørrevang hevur í síni frálíku bók "Úr bjargasøguni" eisini forvitnisligar frásagnir um fuglaveiðu í Stóru Dímun. Her eru eisini áhugaverd gomul skjøl, sum lýsa hesa søgu. Umframt lunda og lomviga vóru eisini onnur fuglasløg veidd. Eitt dømi var rituungar. Ritan eigur ymsastaðni í berginum, og har verða pisurnar sitandi til tær eru floygdar. Beint áðrenn hetta hendir vórðu tær tiknar.

Arne skrivar eisini, at fuglatíðin endar seinast í august mánaði við at farið varð eftir náta og líra.

Seinast í juni var skarvsungin farin at gerast so stórur, at tað lønti seg at fara upp í skarvaurðarnar. Reiðrini vóru rættiliga løtt at finna, og eisini vistu teir, hvar tey plagdu at vera ár um ár. Við einum húki, har agnhaldið var avfílað, á eini sneis, fingu teir fatur á ungunum, sum lógu í reiðrunum inni ímillum teir stóru steinarnar.

Tað eru eisini fleiri mans, sum eru deyðir í bjørgunum.

Johannes Johannesen nevnir í síni bók nakrar tilburðir.

Á sumri 1886 fóru tríggir dalbingar niðan til Dímunar, sum tað varð kallað har. Teir høvdu fingið loyvi til at draga lunda, hóast tað var farið av lundadráttartíð. Hans Petur á Braðnum fall tá norðuri í Braðnum. Hann var fingin aftur á lívi. Men komin til Dals doyði hann, 27 ára gamal.

Í 1891 fall tann 15 ára gamli sonur Johonnu og Heina Joensen, Óli Jákup.

**Í komandi parti** er tað komið so langt við hesi søgu, at Janus giftist við Kinnu úr Sandvík



*Janus í Barmi, har neystið í Dímun upprunaliga stóð*



***Janus hevur verið við til at laga múrarnar á gomlu kirkjuni upp aftur. Tað kundi verið ein áhugaverd verkætlan at sett kirkjuna í upprunaligan stand aftur. Neyvan hevði tað kostað tað stóra heldur***



*Ein partur av berginum í Stóru Dímun nærindis krananum, teir høvdu til at draga vøru upp á oynna við. Myndatakari Andreas Reinert. Hansara myndir eru eisini við í Bjargasøguni*